Foreldrafelagið HEIM&SKÚLI

# *Ársfrágreiðing 2014-15*

Øll nevndin varð afturvald á aðalfundinum 3. mai, harafturat vóru tvey varaumboð vald afturat.

Í nevndini eru: Annika Sølvará, Justin Philbrow, Mildrid á Lógv, Tordis E. Nielsen og Olgar S. Mortensen. Varaumboð eru Súsanna Bertholdsen og Magna Hammer.

Fyrsti nevndarfundur var 15. juni har vit skipaðu okkum og tosaðu um, hvat vit hugsaðu okkum at arbeiða við.

Mál, sum nevndin setti sær fyri at arbeiða við:
- áhaldandi at byggja upp og styrkja sambandið við skúlastýrini umvegis teldupost og annars at samskifta umvegis heimasíðuna heimogskuli.fo og Facebook síðu okkara.
- at skipa tiltøk til førleikamenning av skúlastýrum
- at hava beinleiðis samband og samskifti við Mentamálaráðið og aðrar avvarðandi partar um aktuel mál
- at fáa avklárað spurningin um møguleikan at krevja limagjald frá skúlastýrum í Tórshavnar Kommunu

Vit hava havt 3 formligar nevndarfundir, hava hitst í Havn/Klaksvík 2-3 tímar hvørja ferð, umframt felags fundirnar v.m. Annars hava vit samskift í einum afturlatnum Facebook bólki, teldupost og telefon. Hetta hevur m.a. verið um fyrireiking av fundum, um tíðindaskriv og brøv.

## *Samskifti*

### Kommunufelagið

Vit hava samskift við Kommunufelagið um møguleikan at tað rindar eitt gjald fyri øll skúlastýri. Hendan umsóknin varð ikki gingin á møti.

### Tórshavnar Kommunu

Vit hava eisini samskifti við TK um møguleikan, at TK loyvir skúlastýrum í kommununi at rinda limagjald til H&S. Hendan umsóknin varð ikki gingin á møti.

### Mentamálaráðið

Nevndin hevði havt nakað av samskifti við MMR.

Vit hava samskift um eftimeting av royndarverkætlanum. Víst til skriv og svar.

Vit hava mælt til, at MMR ger yvirskipaða mannagongd í sambandi við ávís álvarslig mál.

Vit hava søkt MMR um eina fasta árliga játtan á 15.000 kr., tí vit ikki fáa kravt limagjald frá øllum skúlastýrum. Fingu munnliga játtan í gjár.

Ymiskt annað var eisini ætlað at taka upp, men hetta náddu vit ikki í ár. Ætlanin at biðja um fund við MMR, so skjótt nýggja nevndin hevur skipað seg. Evnini at taka upp eru fleiri.

## *Fundir*

### *Førleikamenning - Felagsfundur fyri skúlastýri*

Nevndin hevur skipað fyri einum tiltaki til førleikamenning.

Á Sankta Frans Skúla 15. november 2014 hevði Jenny Lydersen upplegg um trivnaðarkanningina, sum Mentamálaráðið skuldi fara undir eftir jól. Magnus Tausen, stjóri á Námi greiddi frá um virksemið hjá Námi og lýsti dømi um nýtt undirvísingartilfar. Serliga varð kjakast um talgilding av tilfari. At enda var kjak um trivnaðarætlanir hjá ymsum skúlum.  Á hesum fundinum vóru fyrst og fremst skúlastýrislimir, gott 20 í tali.

Framløgurnar frá tiltakinum eru á heimasíðuni.

**Fylgibólkur til trivnaðarkanning**
H&S hevur havt umboð í fylgibólkinum til arbeiðið at gera trivnaðarkanning í fólkaskúlanum, kanningin, har sjóneykan verður sett á happing.  Úrslitini av kanningini og ein frágreiðing verða løgd fram í næstum.

**Lærarafelagið**

AS, JP og ML á fundi við nevndina  fyri Lærarafelagið 23. mai 2014 um felags áhugamál.

**Ráðið fyri Ferðslutrygd**

AS, JP og ML á fundi við Ráðið fyri Ferðslutrygd 23. mai 2014 um nýggja undirvísingartilfarið,sum RFF hevur gjørt til Fòlkaskúlan. Vit heittu á FB og í Skúlablaðnum á øll skúlastýri um at seta fokus á ferðslutrygd á felags foreldrafundum í 2014.

**Felags foreldrafundir**

AS var á felags foreldrafundi í skúlanum í Eysturkommunu 17..3.2015 við einum uppleggi um samstarv millum heim og skúla og um felagið.

**Fólkaskúlaráðið**
Hóast Fólkaskúlaráðið átti at verið afturvalt í februar 2014, er ráðið enn ikki virkið. Vit hava boðað frá, at Annika og Justin umboða H&S. Vit bíða enn eftir fundarboðum.

***Miðladekningur 2014/15***

**Skúlablaðið**

Grein í hvørjum blaði, 6 bløð um árið, eru nú eisini lagdar á FB síðuna

**Loftmiðlar og bløð**

Vit sendu út almenna áheitan út um at finna felags loysn fyri netorðabøkur. Vóru í tíðindunum um hetta.

Hava annars sent miðlunum ymiskt tilfar, sum eisini er lagt á heimasíðuna, og okkurt av hesum hevur verið lagt á portalar og prentað.

**Heimasíðan og Facebook**
AS og JP hava leypandi lagt ymiskt aktuelt tilfar á heimogskuli.fo og á FB síðu felagsins.

Annika Sølvará